# Tjóðveldisflokkurin skuldi svara í gjár



*Høgni Hoydal skuldi í gjár svara brævinum frá Fólkaflokkinum*

**POLITIKKUR**
*Eyðun Klakstein*

Tá Sosialurin hevði evstamark í gjár, hevði Tjóðveldisflokkurin ikki svarað Fólkaflokkinum í heitasta politiska málinum í landinum.

Fólkaflokkurin kravdi eftir innanhýsis fund týskvøldið í farnu viku at fáa at vita, um allir tingmenninir hjá Tjóðveldisflokkinum framvegis stuðla samgonguni. Hetta vildi flokkurin hava at vita, eftir at Tórbjørn Jacobsen hevði funnist hvassliga at fólkafloksmonnunum í landsstýrinum.

Fólkaflokkurin vildi eisini hava at vita, um Tjóðveldisflokkurin tekur undir við skuldsetingunum hjá Tórbirni Jacobsen móti Anfinni Kallsberg og Jørgeni Niclasen. Tobbi legði teir báðar undir at hava eina dulda fortíð, har teir høvdu ilt við at skilja ímillum tað hjá sær sjálvum, og tað hjá øðrum.

Í brævinum frá Fólkaflokkinum kravdu Óli Breckmann og Anfinn Kallsberg, at Tjóðveldisflokkurin svaraði innan 22. juli, men løgmaður segði í gjár, at Tjóðveldisflokkurin eisini hevði fingið mánadagin til at svara í.

# Ólavsøkublað í hvørt hús

**Sosialurin hevur gjørt eitt serligt Ólavsøkublað, sum verður borið í hvørt hús í landinum í hesum døgum**

**BLAÐ**
*Eyðun Klakstein*

Tað verður nógv gjørt burtur úr ólavsøkuhaldinum – bæði áðrenn, undir og aftaná – og soleiðis er eisini á Sosialinum.

Sosialurin hevur gjørt eina serliga blaðútgávu til ólavsøku, og hetta blað verður í dag og í morgin borið í hvørt hús í landinum.

Blaðið er á tremur við greinum, myndum, lýsingum og øðrum tilfari, og tað eru starvsfólkini á Sosialinum og Hestprent, sum hava staðið fyri framleiðsluni av blaðnum.



*Sosialurin ger nógv burtur úr ólavsøkuni í serligari útgávu, sum kemur í hvørt hús í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Burtur úr rúgvuni kann nevnast, at blaðstjórin á Sosialinum hugleiðir um vøkru urtagarðarnar í høvuðsstaðnum, sum fólk ikki hava atgongd til. Sosialurin hevur hitt fólk sum dansaran Jónu Thomsen, útvarpsmannin Ova Olsen, politikaran Kaj Leo Johannesen, ítróttarfólk og onnur fólk.

Blaðið er 64 síður til støddar og er í litum.

Tað er Postverkið, sum í hesum døgum ber blaðið til dyrnar kring alt landið.

†

Sagt verður frá, at kæra mamma mín

**Anette Wang**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum
leygarmorgunin 20. juli 90 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
mikudagin 24. juli kl. 14.

*Familjunnar vegna*

**Sverri**

*Tey, ið vilja minnast mammu mína, gera tað best við at lata Amnesty International eina peningagávu, konto í peningastovnunum.*

# 200 myndir í Mikladali

**Hjalmar Waag Høgnesen sýndi um vikuskiftið eldri og nýggjari myndir fram í Mikladali**

**FRAMSÝNING**
*Eyðun Klakstein*

Framsýningarnar eru ikki nógvar í tali í Kalsoynni, men um vikuskiftið høvdu fólk møguleikan fara til eina slíka.

Tað var ein myndaframsýning í Avhaldshúsunum í Mikladali, og Hjalmar Waag Høgnesen, sum í nógv ár var skipari á Barsskor, stóð fyri henni.

Hann hevur eisini tikið tær mongu myndirnar, sum vóru at síggja.

Myndir eru bæði eldri og nýggjari, og tær flestu eru frá tíðini, sum Hjalmar sigldi millum Kalsoynna og Klaksvík.

†

Kæra móðir

**Malla Poulina Sofía Reynbú**
Funningur

andaðist sunnudagin 21. juli 2002,
100 ára gomul.

Farið verður av Korndalbýlinum á Eiði
mánadagin 22. juli kl. 19.

Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju
mikudagin 24. juli kl. 14,
sálmabókin verður nýtt.

Tey, ið vilja minnast Mallu, kunnu lata
Funnings kirkju eina peningagávu,
konto í Føroya Sparikassa.

*Familjunnar vegna*

**John**

# Heilsan til Vilmund Ryggshamar á 70 ára degnum

Tann 23. juli fyllir Vilmund Ryggshamar í Vági 70 ár. Hann vaks upp í tí vakra umhvørvinum vesturi við Vatnið. Foreldur hansara vóru Alvilda og Jens, tey áttu fimm børn, og av teimum var Vilmund elstur.

Sum 14 ára gamal fór Vilmund til skips, hetta var við Johannu við Hilmar Jacobsen sum skipara, pápi hansara var kokkur við. Hann hevur sjálvur mangan sagt frá, hvussu tungt tað var at hála í hetta sjey punds loddið á 90 favna dýpi á Eysturlandinum,og hvussu ringur hann var av gø, hann var jú so ungur.

Men hetta tók ikki hugin til sjógvin frá honum, hann fór síðani sum messudrongur/dekkari við Tofta Regin eystur í Hvíta Havið, skipari var Pól Viberg. Var síðani við Beinisvørð í 3 ár, við Herman Petersen sum skipara, til hann í 1954 fór á skiparaskúla.

Fyrsta skip, hann fekk at føra, var Karl, og var hetta á sildaveiðu og til útróðrar um veturin. Síðani sigldi hann sum stýrimaður við m. ø. Vilhelminu við Esbern Holm, Rádna við Sigurd Simonsen, Hvítubjørn við Jóan Petur hjá Mouritsi, Petur á Gørðunum við Andreas Mikkelsen sum skipara.

Hann var eisini við norskum trolara sum netamaður, sum mammubeiggi hansara Niclas Hovgård førdi.

Vilmund førdi City of Norwich í nøkur ár á saltfiskaveiðu í Grønlandi og Íslandi.

Hann var í Grønlandi við Petur á Gørðunum sum stýrimaður, tá Jóan P. hjá Mouritsi, sum var skipari á Saksaberg, doyði umborð, og fór hann tá umborð á Saksaberg sum skipari. Var eisini eitt skifti skipari við Sjófarinum, sum bróður hansara Jógvan átti. Síðst í seksti árinum var hann stýrimaður við Strandingi, sum svágur hansara Sámal Johan Gårdlykke førdi.

Fyrst í sjeyti árunum fekk Vilmund starv sum vrakieftirlitismaður í Vági, og var hann í hesum starvi, til stovnurin varð avtikin.

Hann hevur altíð havt ein brennandi hug til sjógvin, og er enn til reiðar at fara við Hamraberg á Norðhavið, um Arni manglar ein mann, sjálvt um heilsan ikki altíð er til tað. Um hann kann sigast, sum tað stendur í ørindinum:

»Tá eg var so ungur sum tú, tá mundi eg óræddur renna, nú tekur elli at boyggja meg, sjálvur má eg tað kenna.«

Góði Vilmund takk fyri nógvar góðar løtur á floti saman við tær og Adolf, minnist tú tá vit vóru á Dustara og komu aftur við fullum báti av stórum toski, hetta eru løtur, sum ein landkrabbi sum eg ikki gloymi.

Vilmund giftust í 1959 við Patriciu Gårdlykke úr Lamba, og settu tey búgv úti á Marknoyri,

Tey eiga sonin Tummas, og eru tey nú eisini omma og abbi at lítlu Súsannu.

Vit vilja takka tykkum fyri nógvar góðar løtur, og ynskja tær Vilmundi hjartaliga tillukku við føðingardegnum, og alt tað besta framyvir fyri teg og tíni.

**Yngsti bróðir við familju**



# 100 ára føðingardagur í Svínoy í dag

**Í samband við, at Malla Jacobsen í Svínoy fyllir 100 ár í dag, er stórt tjald sett upp. Borðreitt er fyri 320 gestum til døgurðaborðhaldið, sum verður klokkan tvey seinnapartin í dag.**

**FØÐINGARDAGUR**
*Rúna Sivertsen*

Nógv stákan hevur verið úti í Svínoy upp undir 100 ára føðingardagin hjá Mallu Jacobsen.

Kommunan hevur givið bygdafelagnum eitt planerað øki til tjaldið, sum er sett upp í samband við henda merkisdag hjá Mallu og svínoyingum.

Matgjørt verður í dansistovuni, har 4 komfýrar, 3 gassbluss og ein gassgrýta eru sett upp. Jákup Ziskason ger matin og kemur úr Klaksvík við 10 serveringsdamum.

Eisini er skipað fyri eyka ferðum, bæði úr Hvannasundi og Tórshavn. Umframt, at Másin siglir eftir ferðaætlanini, siglir Ritan av Havnini kl. 7.30. Síðani fer Ritan á Hvannasund, haðani hon siglir útaftur til Svínoyar á middegi.

Til døgurðan, sum verður klokkan tvey seinnapartin í dag, er borðreitt fyri 320 gestum. Jóannes Hansen, sonur Karsten Hansen, sum var ættaður úr Svínoy, skipar fyri; hann verður konferen'cier, sum vit so fínt kalla tað. Jóannes kenna vit best frá valsendingunum hjá SvF.

Hetta er fyrstu ferð, at ein 100 ára føðingardagur er eystan Múlan.

*Nógv verður gjørt burturúr 100 ára føðingardegnum hjá Mallu í Svínoy*








Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið. Í Føroya Sparikassa starvast 181 fólk. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Á grannskoðanardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

**Grannskoðanarleiðari við hugsjónum**

Verandi leiðari av innanhýsis grannskoðanini tekur við aðrari spennandi avbjóðing í Føroya Sparikassa. Vit søkja tí eftir eftir nýggjum grannskoðanarleiðara at byrja skjótast gjørligt.

Høvuðsuppgávan hjá innanhýsis grannskoðanini er at grannskoða ársroknskapin hjá Føroya Sparikassa, dótturfeløgum og Sparikassagrunninum. Grannskoðanin verður framd samsvarandi góðum grannskoðanarsiði og við atliti til galdandi lóggávu, reglur og viðtøkur. Grannskoðanin verður framd í samstarvi við uttanhýsisgrannskoðanina. Arbeiðið fevnir eisini um ráðgeving, eitt nú innan grannskoðan, roknskap og skatt.

Føroya Sparikassi vil skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, har samstarvsevni, nærlagni, effektivitetur og slagkraft eru týðandi eginleikar. Dentur verður lagdur á, at innanhýsis grannskoðanin er virðisøkjandi í sínum arbeiði.

Umsøkjarar skulu hava eina ástøðiliga útbúgving, ið krevst fyri at gerast statsautoriseraður ella skrásettur grannskoðari. Eisini skulu umsøkjarar hava luttikið í praktiskum grannskoðanararbeiði í minsta lagi í 3 ár seinastu 5 árini.

Grannskoðanarleiðarin verður settur av nevndini í Føroya Sparikassa P/F.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Øssur S. Nolsøe, grannskoðanarleiðara, tlf.: 348560, e-mail: ossur.nolsoe@sparikassin.fo.

Umsóknarfreistin er 15. august og umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Sparikassi P/F
Att.: Hr. Petur Zachariassen,
nevndarformaður
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

Reproz · 319450